# Hús í Vestmanna til sølu

Vegna Føroya Skiftirætt verður hendan ognin lýst til sølu.

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja ímillum innkomin tilboð og ongum at taka av.

**Hús í Vestmanna:**
Við hesum verður sethúsaognin matr.nr. 148 d og 176, í Vestmanna lýst til sølu.



Grundøkið er tilsamans 656 m². Húsini eru umleið 60m² í kjallara, miðhædd og lofti.

Kjallari: Óinnrættaður.

Miðhædd: Gangur, baðiverilsi, køkur og 2 stovur.

Loft: Úti á lofti, hjúnarúm og 2 kømur.

Talan er um eini eldri hús, ið standa væl fyri og við sera góðum útsýni.

Á ognini er stórt úthús.

Nærri upplýsingar um omanfyri standandi ogn fáast við at venda sær til undirritaðu..

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**
**100 Tórshavn · Tlf. 311145**

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ó. J. Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3515
**Navn:** Sp/f Spuni
**Adressa:** Sverrisgøta 19, 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 03.03.2003
**Viðtøkudato:** 03.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Anfinn Norðfoss, Grásteinsgøta 8, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Anfinn Norðfoss, Grásteinsgøta 8, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R.C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 03.03.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka heil- og smásølu, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 6. mars 2003*

*Kristin Balle*

# TIL SØLU

**Brúktir Glastrevjabátar**



### MIRAMICHI XL 45

XL-45 føtur x 14,8 føtur
580 HK Cummins, 25 míl ferð. Radar, ekkolodd, plottara, VHF, Auto pilot
Sera væl útgjørdur, nýggjur (apríl 2002)

***Kr. 1.060.000,-***
www.magnamarine.com



### GUIMOND 45

45 føtur x 15,6 føtur, árg 2000 - 670 hk Cummins - 25 míl ferð

***Kr. 1.100.000,-***

45 føtur x 15,6 føtur, árg 2000 - 315 hk Cummins - 18 míl ferð

***Kr. 825.000,-***

45 føtur x 15,6 føtur, árg 1997 - 250 hk Cummins - 15 míl ferð

***Kr. 620.000,-***



### PROVINCIAL 42

42 føtur x 13 føtur, árg 1993 - 300 hk Internationale (500 tímar)

***Kr. 550.000,-***

**Sp/f Bósdalafossur • tlf. 333101 • mobil 253701**

# Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr. í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

**Ókeypis**
Verður sent ópostȧð Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin



Fiskimálaráðið
*Fiskiveiðieftirlitið*

# Maskinstjórar til Fiskiveiðieftirlitið

Fýra størv sum maskinstjórar við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys, til setan 1. juni 2003.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávur:**
- Dagligu ábyrgdina av rakstri og viðlíkahaldi av øllum útbúnaði í maskinrúmunum og rúmum, sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Dagligu ábyrgdina av viðlíkahaldi av øllum dekksmaskinum so sum spølum, kranum og davitum
- Dagligu ábyrgdina av viðlíkahaldsskipanum
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri (STCW-regl. III/3 as Chief Engineer)
- Heilsuváttan fyri sjófólk
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 31. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er maskinstjóri.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2003.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Agnar Poulsen, samskipara.*

Fiskimálaráðið
*Fiskiveiðieftirlitið*

# 1. meistarar til Fiskiveiðieftirlitið

Fýra størv sum 1. meistarar við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys, til setan 1. juni 2003.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávur:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri (STCW-regl. III/3 as Chief Engineer) ella vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer) við útbúgving, sum gevur rætt til vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri.
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. meistari.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnibrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2003.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Agnar Poulsen, samskipara.*

# Ársaðalfundur

Diabetesfelag Føroya heldur ársaðalfund í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10c sunnudagin hin 23. mars 2003 klokkan 15.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Diabetesfelag Føroya**

# Eldrafelagið Nón, Saltangará

Aðalfundurin sum varð lýstur at vera 11. mars er útsettur til 18. mars kl. 19.30.

**Eldrafelagið Nón, Saltangará**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2615, Sp/f BHS Total, 850 Hvalba.

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Birita Olsen, 850 Hvalba.
Innkomin sum stjóri: Herman Olsen, 950 Porkeri.
**Grannskoðari:**
Farin frá sum grannskoðari: Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum grannskoðari:**
Grannskoðaravirkið Højmose, v/ Børge Christiansen, í Heiðum, 370 Miðvágur.

*Skráseting Føroya tann 6. mars 2003*
*Kristin Balle*

# LØGFRØÐINGUR

**Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum deildarstjóri?**

**Vit søknast eftir deildarstjóra til lógardeildina í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya.**

**Vilt tú vita meiri um starvið?**

**Les starvslýsingina á heimasíðu okkara**

**www.tollskatt.fo**

**Toll- og Skattstova Føroya**